# Má halda meg til galdandi lóggávu

**Jóannes Eidesgaard, løgmaður, sigur seg noyðast at halda seg til galdandi lóggávu, og tí noyðast Lisbeth L. Petersen og John Johannesen úr nevndini, sum skal arbeiða fyri øktari kvinnuligar luttøku í politikki**

LÓGGÁVA
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Í grein í blaðnum týsdagin var Kári á Rógvi, løgfrøðingur og formaður í Javnstøðunevndini, ikki blíður. Hann harmaðist um, at Lisbeth L. Petersen, varð koyrd frá sum forkvinnu í nevndini, sum skal arbeiða fyri øktari kvinnuluttøku í politikki. Og metti hann tað vera rein formalisma, at løgmannsskrivstovan tók fram lógargrein 8 í stýrisskipanarlógini, og koyrdi Lisbeth L. Petersen og hitt løgtingsumboðið í nevndini, John Johannesen, frá. Kári á Rógvi segði, at um tey skuldu úr nevndini fyri kvinnuligari luttøku, so áttu løgtingslimir eisini heldur at verið í stjórnarskipanarnevndini.

– Hatta er ein óneyðug og formalistisk avgerð. Um hon skal frá, skulu løgtingslimir heldur ikki vera í Grundlógarnevndini, segði hann.

### Lógir kunnu broytast

Vit settu løgmanni stevnu at fáa hann at viðmerkja sjónarmið Kára á Rógvi.

Løgmaður sigur seg harmast íkomnu støðuna, og at hann partvíst er samdur við Kára um, at stýrisskipanarlógin í støðum er ein forðan fyri politiska viljan.

– Men eg má sjálvsagt halda meg til galdandi lóggávu og ikki til lóggávuna, sum eg kundi hugsað mær hana, sigur løgmaður.

Spurdur, hvussu hesin hugburður samsvarar við herferð Javnaðarflokksins undir sjálvstýristilgongdini, tá flokkurin var fremsti forsprákari fyri, at lógir skulu mýkjast og roynast, og ikki minst avspegla politiska viljan, sigur Jóannes Eidesgaard, at hetta er satt, og at lógin má broytast, um hon ikki livir upp til nútíðar krøv.

Og hann vísir á Helsingforsavtaluna, sum í roynd og veru er ein forðan fyri føroyskum limaskapi í Norðurlandaráðnum, men at hetta kortini ongantíð hevur forða okkum at søkja um limaskap, tí sum sagt: lógin kann broytast..

– So eg kann partvíst vera samdur við Kára á Rógvi í, at lógin ikki er nóg góð. Men sum sagt, hon er galdandi lóg og tí noyðist eg at halda meg til hana. Smb. “de lege ferenda” - galdandi lóggáva og “de lege ferenda” – hvussu galdandi lóggáva átti at verið. Hetta er vónandi nakað, sum nýggja stjórnarskipanarnevndin fer at arbeiða við, sigur løgmaður.

### Týdningarleysar próvgrundir

Í viðmerkingunum frá Kára á Rógvi kom greitt til sjóndar, at tað harmaði hann, at júst Lisbeth ikki slapp at halda fram við arbeiðinum í nevnini. Hetta, av tí, at hon í so mong ár hevur arbeitt við javnstøðumálum og at hon í sínari tíð nærum var sjálvskrivað til at gerast forkvinna í nevndini.

Til hetta sigur løgmaður, at ongin hevur reist iva um førleikan hjá Lisbeth L. Petersen at leiða slíkt nevndararbeiði.

– Men tað er ongin próvgrund í hesum sambandinum, at Lisbeth er dugnalig og væl skikkað til sessin. Eg má halda meg til galdandi lóggávu. Eiheldur er tað haldgóð próvgrund, í hesum sambandi, at onnur nevnd (stjórnarskipanarnevndin) er mannað við løgtingslimum, tí har er støðan ein heilt onnur (vísandi til svar til munnligan fyrispurning í tinginum í dag), sigur løgmaður.





*Lisbeth L. Petersen og John Johannesen kunnu ikki vera sitandi í nevndini, sum skal fáa fleiri kvinnur uppí politikk*

### Vón fyri framman

Kortini sigur Jóannes Eidesgaard, at tað finnast fleiri loysnir, um Løgtingið ynskir, at løgtingslimir skulu sita í nevndini, sum skal arbeiða fyri at fáa fleiri kvinnur upp í politikk

– Um flokkarnir ynskja tað, kunnu teir heita á landsstýrið um at seta eina § 25 nevnd í tingskipanini. Hendan kann so vera mannað við umboðum úr tinginum, sigur hann, og vísir eisini á, at Lisbeth L. Petersen kann fara í farloyvi úr tinginum, meðan hon er forkvinna í núverandi nevndini.

## FAKTA

**Reglur um tingmenn og álitisstørv í nevndum og ráðum**

§8 Tá ið góðkent er, at løgtingsmaður er valdur, skal hann leggja frá sær øll álitisstørv í nevndum, ráðum o.t., sum eru undir eftirliti landsstýrisins ella, sum landsstýrið hevur skipað hann í, tó undantikin beinleiðis fólkavald umboð.

Í viðmerkingunum til hesa grein verður sagt (stýrisskipanarálitið bls. 177):
Skal eitt eftirlit hava nakra veruliga meining, er neyðugt, at hetta er púra óheft av tí, tað skal hava eftirlit við. Landsstýrið hevur beinleiðis eftirlit við persónum, sum hava álitisstørv í nevndum og ráðum, vald av landsstýrinum, og stovnum annars, sum eru undir eftirliti landsstýrisins. . Løgtingið hevur eftirlit við landsstýrinum. Tað er tí ein mótsøgn, at løgtingsmenn kunnu hava eftirlit við landsstýrismonnum, sum so aftur hava eftirlit við somu løgtingsmonnum, tá teir eru í starvi hjá nevndum og ráðum og øðrum størvum undir landinum. Tí er í greinini ásett, at beint sum løgtingsmaður er valdur, so sigur hann størv frá sær í ráðum og nevndum og teim størvum, sum umrødd eru.

# Munurin er greiður

**Munnligur fyrispurningur í tinginum í dag. Hvør er munurin millum stjórnarskipanarnevndina og nevndina viðvíkjandi kvinnuleikluti í politikki. Annita á Fríðriksmørk spyr løgmann**

LÓGGÁVA
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Eftir at Kári á Rógvi samanbar samansetingina av nevndini fyri øktari kvinnuluttøku við stjórnarskipanarnevndina, setti Annita á Fríðriksmørk, løgtingskvinna fyri Tjóðveldisflokkin, í dag løgmanni ein munnligan fyrispurning í tinginum. Har spurdi hon, hvør munurin er millum stjórnarskipanarnevndina og nevndina viðvíkjandi kvinnuleikluti í politikki.

Til hetta sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður, at



*Annita á Fríðriksmørk spyr løgmann um munin millum stjórnarskipanarnevndina og nevndina, sum skal abei›a fyri øktari kvinnuluttøku í politikki*

nevndin um kvinnuleiklut er beinleiðis vald av landsstýrismanninum og hann fyriskipar virksemið hennara. Einki er lógásett um, at tingmaður skal vera valdur í nevndina. Løgtingsmenninir í stjórnarskipanarnevndini eru harafturímóti lógásettir limir í nevndini og arbeiða sjálvstøðugt, sigur hann.

– Lesa vit orðaljóðið av § 8 málsliga, so síggja vit, at valið av tingmonnunum Lisbeth L. Petersen og John Johannesen í nevndina viðvíkjani kvinnuleikluti er í beinleiðis andsøgn við § 8. Tað snýr seg um ”øll álitisstørv”. Bert tvær avmarkingar eru. Nevndir, sum landsstýrið ikki hevur valt, og sum landsstýrið ikki hevur eftirlit við, falla uttanfyri. Sama er, um nevndin hvílir á fólkavald umboð, sigur Jóannes Eidesgaard, sum leggur afturat, at einki stendur at lesa um, at tað er ein fyritreyt fyri, at tingmaður ikki kann vera í slíkari nevnd, at nevndin bara fæst við umsitingarligar ella avgerðarheimildir.

– Tvørturímóti stendur beinleiðis, at talan er um øll álitisstørv í nevndum og ráðum. Tað stendur ikki álitisstørv í nevndum, sum hava umsitingarligar ella avgerðarheimildir. Heldur ikki stendur nakað at lesa í viðmerkingunum um, at hugsað var bara um álitisstørv í nevndum og ráðum, sum hava umsitingarligar ella avgerðarheimildir.

Sambært løgmanni og løgmannsskrivstovuni, bendir alt hinvegin øvugt á, at intentiónin við lógagreinini var, at hon fevndi um lógarfyrireikandi nevndir eisini. Løgtingið hevur eftirlit við øllum virksemi hjá landsstýrinum. Tað er ikki avmarkað til at hava eftirlit við, bert hvussu landsstýrismenn útinna sítt fyrisitingarliga starv. Ætlanin var eisini, at løgtingið skuldi hava eftilit við lógarfyrireikandi arbeiðnum hjá landsstýrinum. Tað er júst hetta, sum § 8 leggur upp fyri. At eitt eftirlit hevur eftirlit við sama eftirliti, sum hevur eftirlit við sær, ber ikki til.

– Við stjórnarskipanarnevndini er støðan ein heilt onnur. Hon er sett við løgtingslóg, greiðir løgmaður frá, og leggur afturat, at løgtingslimirnir, sum eru limir, eru ikki valdir av landsstýrinum, men av flokkunum og skulu sambært lógini vera løgtingsmenn. Man kann so tulka, hvørt nevndin er undir eftirliti av landsstýrinum ella ikki. Løgtingið hevur tulkað, at nevndin er ikki undir eftirliti av landsstýrinum, tí annars hevði tingið ikki ásett, at tingmenn skuldu vera í nevndini. Løgtingið heldur seg sjálvsagt til stýrisskipanarlógina § 8, og løgmaður fer ikki og metir seg ikki hava heimild at umtulka hesa avgerð tingsins. At nevndin ikki er undir vanligum eftirliti hjá landsstýrinum sæst eisini av, at løgmaður velir formannin, men er annars bara vanligur nevndarlimir í nevndini sum, eins og aðrir nevndarlimir, má geva seg undir allar avgerðir nevndarformansins í arbeiðnum.

– Tí dugi eg ikki at síggja, at avgerðin um at velja aðrar nevndarlimir enn tingmenn í nevndina viðvíkjandi øktum kvinnuleikluti í politikki, fær nakra ávirkan á stjórnarskipanararbeiði.